ADVOKAT VIRKIÐ

SKEIÐ:

## STARVSFÓLKAAVGERÐIR

ENDAMÁL:
Skeiðið skal geva luttakarunum innlit í tær reglur, sum galda, tá ið avgerðir viðvíkjandi starvsfólki skulu takast - til dømis at geva starvsfólki tænastuboð, ella tá talan er um flyting, ávaring, uppsøgn ella burturvísing. Ta síðstu tíðina eru bæði løgfrøðilig teori og rættarpraksis í stóran mun broytt. Reglur í løgtingslóg um fyrisiting, løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum og øðrum lógum við hava støðugt størri ávirkan á málsviðgerð av starvsfólkamálum, eins og løgtingsins umboðsmaður og danski starvsbróður hansara eisini ávirka rættarstøðuna. Dómstólarnir hava tey seinastu árini eisini lagt seg á annan bógv, soleiðis at skeiv málsviðgerð í starvsfólkamálum ferð eftir ferð hevur havt við sær rættiliga stóra endurgjaldsskyldu. Á skeiðnum verður m.a. komið inn á

- fyrisitingarlig krøv til málsviðgerðina av starvsfólkamálum, herundir serliga
- avgerðir hjá løgtingsins umboðsmanni og folketingets ombudsmand
- gjøgnumgongd av rættarpraksis í Føroyum og Danmark

LUTTAKARAR:
Skeiðið er ætlað persónum, sum taka avgerðir í starvsfólkamálum í landsumsitingini og í kommunalum og interkommunalum stovnum eins og formonnum, nevndarlimum, skrivarum og álitisfólkum í fakfeløgum, sum hava limir í starvi í landsumsitingini ella hjá kommunum.

SKEIÐDAGUR og -STAÐUR:
Skeiðið varir í ein dag og verður í Tórshavn. Kunngjørt verður seinni hvar.

Fyrra skeiðið: Fríggjadagin 29. august 2003
Seinna skeiðið: Fríggjadagin 5. september 2003

PRÍSUR:
4.500 kr., umframt MVG.
Upphæddin verður at gjalda eftir uppkravi

TILMELDING:
Tekning fer fram við at ringja, senda fax ella at senda e-mail til ADVOKATVIRKIÐ:

Telefon: 312171 ella 312227
Telefax: 315874 ella 312241
E-mail: advokatvirkid@advokatvirkid.fo

TILMELDINGARFREIST:
Í seinasta lagi 25. juni 2003

# Sosialurin

– hevur fingið nýtt telefonnummar

tel 34 18 00

fax 34 18 01

heimasíða: www.sosialurin.fo

teldupostur: post@sosialurin.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3578
**Navn:** Sp/f FH
**Adressa:** 410 Kollafjørður.
**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 27.04.2003
**Viðtøkudato:** 27.04.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Finnbogi D. Hansen, 410 Kollafjørður.
**Stjórn:** Finnbogi D. Hansen, 410 Kollafjørður.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum.
**Grannskoðari:** P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 27.04.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Felagsins endamál er at reka fiskivinnu o.a. í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 17. juni 2003*

*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag móttikið fusiónsætlan samsv. § 134 a í P/F- lógini:**

**A. Navn:** P/F Føniks (P/F-nr. 277), 100 Tórshavn.

**og**

**B. Navn:** P/F Karl Fr. Johansen (P/F-nr. 19), 100 Tórshavn.

Harumframt hava vit móttikið váttan frá metingarmanninum samsv. § 134 c, stk. 4 í P/F-lógini.

*Skráseting Føroya tann 17. juni 2003*

*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 2119, P/F Horisont, 530 Fuglafjørður.

**Viðtøkur broyttar:** 12.03.2003.
**Kapitalur:** Hækking við kr. 500.000,00 til kr. 1.600.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 500.000,00 til kurs 100.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Óli Samró, Marinargøta 9, 188 Hoyvík.
**Innkomin í nevndina:** Árni Joensen, Norðurrás 8, 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya tann 16. juni 2003*

*Kristin Balle*

---

# Útbjóðing

Í sambandi við bygging av **Eldrasambýli fyri Gøtu Kommunu** verður arbeiðið hervið boðið út í almenna lisitatión.

Høvuðsarbeiðstøkan fevnir um:
- Timbur- og snikkaraarbeiði
- Múraraarbeiði
- HVS-arbeiði
- El-arbeiði

Lisitatiónin verður í kommunuskrivstovuni í Gøtu hósdagin 17. juli 2003.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast í seinasta lagi 30. juni 2003 á Teknistovuni í Gøtu við at gjalda kr. 5.000,- í veðhaldi á konto 6460-165 7404 í Føroya Banka.
Veðhaldið verður afturgoldið, tá útbjóðingartilfarið verður aftursent í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina.

**sp/f Teknistovan**
v. Jens Kl. Jacobsen og Henning Olsen,
ráðgev. byggifrøðingar
FO-510 Gøta
tel. 442105 - fax. 442107
e-mail: klement@post.olivant.fo

# Bygningur hjá Hydro Tech PF til sølu



Um hóskandi boð fæst er framleiðslubygningurin hjá Hydro Tech á Eiði til sølu.

Samlaða gólvvíddin er 1200 m² (30 x 40 m). Av hesum eru 200 m², í tveimum hæddum, nýtt til goymslu, skrivstovu, fundarhøli, umklæðingarhøli og matarhøli.
Í høllini eru monteraðir tveir 5 tons traverskranar.
Arbeiðshæddin er 8 m.

Áhugað kunnu venda sær til Ólav Asafsson Olsen á skrivstovuni hjá KJ-Hydraulik á Kambsdali, tlf. 444170 frá kl. 08.00 til 16.00, ella senda ein teldupost til: oao@kj-hydraulik.com

# Aðalfundur

Klaksvíkar Sjónleikarfelag hevur aðalfund týsdagin 1. juli 2003 kl. 20.00 í Atlantis.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**



# Góðir brúktir bilar

| | |
|---|---|
| **Nissan Almera 1.6 SR** gráur, árg 1997, 4 hurðar, km. 78.000 **87.000** | **Opel Astra 1.6 Comfort** svartur, árg 1998, 5 hurðar, km. 77.000 **95.000** |
| **Nissan Primera 2.0 LX** koboltbláur, árg 1997, 4 hurðar, km. 63.000 **92.000** | **Opel Astra 1.6 Elegance Stc.** gráur, árg 2001, km. 21.000 **165.000** |
| **Peugeot 306 Diesel** grønur, árg 1996, km. 155.000, fyrr 75.000,- **nú 70.000** | **Opel Vectra 1.6 GLi** svartur, árg 1994 4 hurðar, km. 122.000, fyrr 59.000,- **nú 45.000** |
| **Peugeot 306 Diesel** bláur, 5 hurðar, km. 203.000 **65.000** | **Saab 9-3 Tid 2.2 115 HK** bláur, árg 1998, 5 hurðar, km. 117.000 **155.000** |
| **Peugeot 306 Diesel** bláur, árg 1996 4 hurðar, km. 130.000, fyrr 65.000,- **nú 55.000** | **Saab 900 2.0i 130 HK** árg 1996, 5 hurðar, km. 69.000 **95.000** |
| **Peugeot 406 ST 2.1 DT** vínreyður, árg 1997, km. 195.000 **125.000** | **Saab 900 2.0 128 HK** grønur, árg 1991, 4 hurðar **50.000** |
| **Peugeot 406 ST 2.1 DT** bláur, árg 1998, km. 153.000, fyrr 127.000,- **nú 115.000** | **Ford Escort 1.6 St. car** reyður, árg 1996, 5 hurðar, fyrr 65.000,- **nú 50.000** |
| **Peugeot 406 ST 2.0 Hdi v/airc** vínreyður, árg 1999, 4 hurðar km. 120.000, fyrr 154.000,- **nú 145.000** | **Ford Escort 1.8** svartur, árg 1998, 5 hurðar, km. 123.000, fyrr 85.000,- **nú 74.000** |
| **Opel Agila 1.2** grønur, árg 2001, 5 hurðar **92.000** | **Mitsubishi Carisma 1.6** árg 1996, 5 hurðar **88.000** |
| **Opel Astra 1.7DT St. car** reyður, árg 1999, 5 hurðar, fyrr 115.000,- **nú 110.000** | **Kia Sephia 1.5** bláur, árg 1997, 4 hurðar, km. 89.000 **55.000** |
| **Opel Astra 1.7DT** bláur, árg 1996, 5 hurðar, km. 159.000, fyrr 52.000,- **nú 45.000** | **Ford Sierra 1.8 DT** vínreyður, árg 1993, 4 hurðar **45.000** |
| **Opel Astra 1.7D** grønur, árg 1996, 4 hurðar, km. 120.000 **43.000** | **Ford Escort Van 1.8 Diesel** gráur, árg 2000, 3 hurðar, km. 74.000, nýsýnaður **68.000** |
| **Opel Astra 1.7DT** grønur, árg 1997, 4 hurðar **65.000** | **Toyota Picnic 2.0 6 sitipl.** hvítur, árg 1997, 5 hurðar, km. 73.000 **130.000** |

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

**P/F Meinhardt Arge**
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Sosialurin 341800

COMPAQ Local Service Partner
hp invent

- Teldur
- Farteldur
- Servarar
- Netloysnir
- Firewall/trygdareftirlit
- Netumsiting

www.com-data.fo

COM-DATA
Klaksvík tlf. 476100 Saltangará tlf. 449840

FØROYA LANDSSTÝRI

HEIMARØKTIN & SERFORSORGIN

# Søkt verður eftir samdøgursrøkt til Heimarøktina

Almannamálaráðið hevur avgjørt at seta í verk samdøgursrøkt í øllum landinum. Í hesum sambandi er ætlanin at seta røktarstarvsfólk í teimum 6 heimarøktarøkjunum kring landið. Tænastan skal veitast til fólk, sum búgva heima og inni á stovni.

Vit sóknast eftir sjúkrarøktarfrøðingum og/ella heilsurøktarum sum:

- Hava hug og hegni til at vera við í einari skipan, sum er í menning og broyting
- Sum ynskja at brúka teirra útbúgving og førleika best møguligt
- Hava royndir í at arbeiða sjálvstøðugt og helst innan fyri tað primera økið
- Evni at arbeiða sjálvstøðugt við ábyrgd
- Duga at samskifta
- Góð samstarvsevnir og vera før fyri at arbeiða undir skiftandi umstøðum

**Vit bjóða:**

- Eitt nýtt starv við møguleikum fyri at skipa og menna starvsinnihald
- Eitt spennandi arbeiðspláss við nógvum sjúkrarøktarfagligum uppgávum
- Eitt gott arbeiðsumhvørvi
- Eitt sjálvstøðugt og fjølbroytt arbeiði

**Setanar- og lønarviðurskifti:**
Talan er um størv við setanarstað í Heimarøktini og við ábyrgd mótvegis økisleiðaranum. Arbeiðsøkið verður í einum av teimum 6 heimarøktarøkjunum.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Umsókn við neyðugum prógvum/viðmælum verður at senda til eina av niðanfyri nevndu økiskrivstovum, har eisini nærri upplýsingar um størvini fáast.

- Øki 1 Suðurstreymoy, Heimarøktin, Skálatrøð 14, 100 Tórshavn, tlf. 317249
- Øki 2 Vágar/Norðstreymoy, Heilsumiðstøðin, 370 Miðvágur, tlf. 333249
- Øki 3 Eysturoy, Heilsumiðstøðin, 620 Runavík, tlf. 449249
- Øki 4 Norðoyggjar, Bøgøta 34, 700 Klaksvík, tlf. 457243
- Øki 5 Suðuroy, Heimarøktin, 900 Vágur, tlf. 373907
- Øki 6 Sandoy, Árgarðúr, 210 Sandur, tlf. 361749

**Umsóknarfreist er 2. juli 2003, kl. 12.00**

veitst tú ikki tað?

# Sosialráðgevi

## til Sosialu Deild hjá Klaksvíkar Kommunu

Á Sosialu Deild hjá Klaksvíkar Kommunu er eitt fulltíðarstarv sum sosialráðgevi leyst at søkja til setan 1. august 2003 ella skjótast tilber.

Størvini á sosialu deild eru í løtuni hesi: ein leiðari, ein sosialráðgevi, ein barnaansingarsamskipari/stuðulsráðgevi, ein dagrøktarleiðari, ein námsfrøðingur hjá dagrøktini, ein skrivstovunæmingur og eitt skrivstovufólk hálva tíð.

**Arbeiðsuppgávurnar hjá sosialráðgevanum verða – við tilvísing til deildarleiðaran – at taka sær av málum, sum løgd eru til deildina at umsita, herundir m.a.:**
- at fyrireika mál til nevndarviðgerð
- at ráðgeva og vegleiða barna- og ungdómsfamiljum við serligum tørvi
- at ráðgeva barnaverndini í barnaforsorgarlógini
- at seta í verk og fylgja upp fyriskipanir
- at virka sum samskipari í málum, har fleiri myndugleikar eru við
- at samstarva tvørfakliga
- at góðkenna og hava eftirlit við fostur- og umlættingarfamiljum
- aðrar málsviðgerðaruppgávur á sosialu deild

**Vit leita eftir starvsfelaga, ið:**
- er útbúgvin sosialráðgevi
- hevur royndir sum málsviðgerði og stóran áhuga at arbeiða við barna- og ungdómsfamiljum við serligum tørvi
- megnar at seta seg inn í støðuna hjá familjum, og hjálpa teimum út frá hesum
- megnar at vera nágreiniligur og samstundis hava nógv at gera
- hevur gott yvirlit
- dugir væl at orða seg
- kann málsviðgera regluliga

**Vit bjóða tær:**
- Eitt spennandi arbeiði við nógvum avbjóðingum
- Góðar samstarvsfelagar
- Supervisión

Løn og setanarviðurskifti sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Starvsmannafelagið.

**Fleiri upplýsingar**
fáast við at venda sær til sosialdeildarleiðaran Jancy B. Klein ella Tonju Ziskason sosialráðgeva á telefon 410000 millum kl. 10 og 16.

**Søk starvið**
við at senda okkum eina umsókn seinast 7. juli 2003
Umsóknin skal sendast til:

**Klaksvíkar Kommuna**
Sosiala deild
Postboks 2
700 Klaksvík

# Opel Vectra

Árg. 89, v/ brotnum gearkassa, til sølu sum eykalutir. Hevur plátur.

**Tlf. 373824**